Frítíðaravloysarar

# Oyggjaleiðir




Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum til strandfaraskipini.

**Størvini fevna um**
Stýrimenn, maskinmeistarar, dekkarar, kokkar og tænastufólk.

**Prógv/førleikakrøv**

*Stýrimenn:*
- STCW áteknað vinnubræv sum stýrimaður ella skipari við handilsskipum
- Heilsuprógv/kagtænasta
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkileiðari
- STCW áteknað GMDSS prógv

*Maskinmeistarar:*
- STCW áteknað vinnubræv sum skipsmaskinmeistari ella maskinistur
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Roykkavari

*Dekkarar:*
- Fulltikin matrósur (min. 18 mðr. siglingartíð)
- Siglingarbók
- Heilsuprógv/kagtænasta
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Roykkavari
- Grundskeið í fyrstuhjálp

Umsøkjarar, ið hava stóra koyrikortið, hava fyrimun.

*Kokkar:*
- Vinnubræv sum skipskokkur
- Siglingarbók
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkiskeið
- Grundskeið í fyrstuhjálp

*Tænastufólk (sølufólk/catering):*
- Siglingarbók
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkiskeið
- Grundskeið í fyrstuhjálp

Annars rokna vit við, at tú hevur góð samstarvsevni, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert kundavinalig/ur og røkin.

Umsøkjarar, ið hava tilbúgvingarskeið, hava fyrimun.

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att.: Rakstrardeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í **seinasta lagi 30. apríl 2004**.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Nainu Samuelsen, manningarsamskipara, tlf. 34 30 44 ella T-post: nbs@ssl.fo

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

# Fulltrúi til Fíggjardeildina

Eitt starv sum fulltrúi innan fíggjarøki á Almannastovuni verður við hesum lýst leyst til setan skjótast gjørligt. Starvið er skipað við ábyrgd mótvegis Fíggjarleiðaranum á Almannastovuni.

Á deildini starvast í løtuni 8 starvsfólk, ið taka sær av EDV kervinum, rakstrinum og teimum lógarbundnu útreiðslunum, sum Almannastovan umsitur.

**Uppgávurnar hjá fulltrúanum verða í høvuðsheitum:**
- Roknskapararbeiði fyri Almannastovuna og tað lógarbundna
- Lønarumsiting
- Rakstrar uppgávur
- Grannskoðan av sjúkrakassunum
- Frágreiðing í samband við roknskap
- Viðvirka í øðrum arbeiðsuppgávum á deildini.

**Vit kunnu bjóða:**
- Starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum.
- Starv við møguleika fyri ábyrgd og fakligari menning
- Starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað einstaka starvsfólki.

**Vit ímynda okkum ein persón, sum hevur:**
- roknskaparliga útbúgving t.d. merkonom
- hevur royndir innan roknskapar- og greiningararbeiði
- hevur royndir innan tað sosiala umráði og fíggjarlógararbeiði
- hevur góðar málsligar eignleikar, bæði í skrift í talu
- góð samstarvsevni, bæði til at arbeiða sjálvstøðugt og í bólki.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Søren Bruhn, fíggjarleiðara á tlf. 346441 ella tlf. 215478.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og møguligum referensum skal sendast til:

**Almannastovuna**
J. Broncksgøta 27
Postrúm 3096

**Umsóknarfreist:** 28. apríl 2004.

***Um Almannastovuna***
*Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.*
*Almannastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landsdekkandi serdeildir*

# Til sølu




BMW 325i árg. 12/90, nýsýnaður.

Sera lagalig fígging.

**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
**Tel. 317300 ella 217300**

# Hølir í Tórshavn til leigu

Skrivstovuhøli til leigu.
Hølini er uml. 100 $m^2$ og er møguleiki fyri at víðka til 200 $m^2$. Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er høli 200 $m^2$ til leigu, ið er væl egnað til goymslu, verkstað og annan ídna. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í hølinum.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin í Øksnagerði eftir:**
- einum pedagogi til nýstovnaða vøggustovu at starvast 30-35 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1. juni 2004.
- einum pedagogi í barnagarðsstovu at starvast 30-40 tímar um vikuna. Starvið verður sett 15. august 2004.
- einum hjálparfólki fyri fólk í farloyvi at starvast 40 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1. juni 2004.

Leiðari: Jesper Roos, tlf. 319959
Øksnagerði 1
FO 100 Tórshavn

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. mai 2004.

**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Dagstovnurin í Øksnagerði**
Í dagstovninum ganga 62 børn. Stovnurin er skipaður við eini vøggustovu við 12 børnum, tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari serstovu við 10 børnum. Á stovninum starvast 19 starvsfólk.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Leiðari til Brennistøðina

Søkt verður eftir leiðara til Kommunalu Brennistøðina at byrja skjótast til ber.

**Høvuðsuppgávan verður m.a. at**
- skipa fyri dagliga virkseminum á Brennistøðini, endurnýtslu-, jarnmóttøku- og tyrvingarplássinum
- tryggja, at øll krøv innan m.a. umhvørvi og arbeiðsvernd verða fylgd
- fyrireika mál, sum skulu til politiska viðgerð
- samskifta við eftirlitsmyndugleikar, stovnar og viðskiftafólk
- luttaka í fíggjarætlanararbeiðinum og ansa eftir at galdandi játtanir verða hildnar
- tryggja, at Brennistøðin er eitt gott arbeiðspláss, har dentur verður lagdur á trivnað og umhvørvi og har hugburðurin er á einum høgum støði

**Tórshavnar kommuna roknar við, at umsøkjarin**
- hevur viðkomandi útbúgving innan øki, t.d. umhvørvisverkfrøðingur
- hevur teldukunnleika (Microsoft Windows,Word, Excel og Outlook)
- hevur neyðugar royndir at røkja starvið

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 35. lønarflokki sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og Tænastumannafelagið. Setanin verður við 1 ára royndartíð.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, telefon 31 51 60

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. mai 2004, kl. 13.00. Viðmerk brævbjálvan "Leiðari á Brennistøðini".

Setanarsamrøður verða í viku 21 og 22

**Kommunala Brennistøðin**
tekur ímóti dagrenovatión og ídnaðarruski og øðrum burturkasti til endurnýtslu, brenning og tyrving.

Orkan frá brenningini verður nýtt í fjarhitaskipanini í kommununi.

Bilar og annað jarn verður móttikið, umhvørvisviðgjørt, samantrýst og síðani sent uttanlands til endurvinningar.

Vandamikið burturkast verður móttikið, pakkað og sent til Kommunukemi til viðgerðar.

Spillolja verður móttikin og víðariviðgjørd av IRF.

Rottangar verða tømdir.

Renovatiónsøki er í støðugari menning, soleiðis at vaksandi krøv og ynskir innan umhvørvi, viðgerð og trygd verða rokkin.

www.torshavn.fo

[ ...ein vinnari hatar at tapa, men óttast hesum ikki!... ]

**SKEIÐ**

[ Hevur tú neyðugu styrkina tá á stendur? ]

Ger sum David Beckham, Bjørn Borg, Peter Gade, Ingrid Kristiansen og túsundtals aðrar stjørnur; brynjað teg til mentalu avbjóðingarnar eftir leistinum hjá kenda, norska ítróttarsálarfrøðinginum, Willi Railo, professara...

Verður tú stýrd/ur av kenslum tá á stendur, kann hetta koppa øllum, hóast tú ert væl fyri annars. Á skeiðnum fært tú innlit í, hvussu tú kanst stýra kenslum sum præstatiónsangist, nervøsiteti, aggressión, sjálvsáliti, frælsi, gleði og dirvi. Tú fært eitt gott "mentalt amboð", sum fer at hjálpa tær at seta mál og røkka teimum.

- Fyriskipari: Synergi saman við DIF (Danmarks Idræts-Forbund)
- Skeiðsleiðari: Jørn Ravnholt, sum hevur samskipa ítróttarpsykologisku ráðgevingina hjá Team Danmark í 16 ár
- Staður og dagur: 21. og 22. mai í FSF-húsunum
- Málbólkur: Venjarar, hjálparfólk, leiðarar, ítróttarfólk og onnur, sum ynskja innlit í og grundleggjandi vitan um ítróttarpsykologi.
- Kostnaður: kr. 2.000 + MVG 500 kr. - Matur íroknaður
- Gisting: Møguleiki er at gista í FSF-húsinum fríggjanátt kr. 250,- í 4-manskamari
- Tilmeldan: www.synergi.fo ella tel 22RING (227464) · 22KIMA (225264) kl. 13.00 - 16.00

**TEMAKVØLD**

[ Hevur tú neyðugu styrkina tá á stendur? ]

- Fyriskipari: Synergi saman við DIF (Danmarks Idræts-Forbund)
- Skeiðsleiðari: Jørn Ravnholt
- Staður og dagur: 20. mai frá kl. 19.30 - 22.00 í Róðraneystinum á Glyvrum
- Málbólkur: Ítróttarfólk, bæði íðkarar og onnur, ið hava áhuga í evninum
- Kostnaður: kr. 220 + MVG 55 kr.
- Tilmeldan: www.synergi.fo ella á Kunningarstovuni í Saltangará - tel 449 449

Team85

Melda til nú - avmarkað pláss! Fleiri upplýsingar á www.synergi.fo



synergi@synergi.fo · tel 22RING (227464) · tel 22KIMA (225462) · www.synergi.fo Synergi

# Universitetsútbúgvingar á Náttúruvísindadeildini

Í summar kanst tú byrja at lesa á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Útbúgvingarnar eru:

- BSc í ravmagnsverkfrøði
- BSc í kolvetnisverkfrøði
- BSc í jarðalisfrøði
- BSc í teldufrøði
- BSc í lívfrøði

Verkfrøðingaútbúgvingarnar taka 3 1/2 ár, meðan hinar taka 3 ár. Útbúgvingarnar eru skipaðar í modulum, og tí ber eisini til at melda seg til og taka prógv í einstøkum lærugreinum.

**Upptøkutreytir**
Fyri at lesa lívfrøði krevst antin stødd-, alis- og evnafrøði á B-stigi ella B-stig í stødd- og alisfrøði saman við C-stigi í evnafrøði og A-stigi í lívfrøði. Fyri at sleppa inn á hinar fýra útbúgvingarnar krevst stødd-, alis- og evnafrøði á ávikavist stigi A, B og C. Aðrar fortreytir kunnu koma upp á tal eftir nærri meting í hvørjum einstøkum føri. Kunning um upptøkukrøv til einstakar lærugreinir fæst frá Náttúruvísindadeildini ella á heimasíðuna hjá Fróðskaparsetrinum www.setur.fo

**Umsóknarbløð**
Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum ella við at venda sær til Náttúruvísindadeildina. Á heimasíðuni er kunning um útbúgvingarnar.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Náttúruvísindadeildina, Postboks 2109, FO 165 Argir. Umsóknarfreistin er *1. juli 2004*. Boð um upptøku verða givin í seinasta lagi 16. juli 2004. (Næstu ferð, tikið verður upp, verður í 2006).

Meir fæst at vita um lestrarmøguleikarnar við at vitja á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni 3 í Tórshavn ella við at ringja á telefon 352550.